Sosialurin
Nr. 180 - 19. september 2006

Fólkaheilsurenning 2006:

# Nú víðari kring landið

**Í ár verða tað ikki bert fólk í Havn og í Suðuroynni, ið skulu fara í renniskógvarnar, tí nú fáa øll kring landið møguleika fyri at vera við í Fólkaheilsurenningini.**

FÓLKAHEILSU-RENNING

- Tað er frálíkt, at vit kunnu endurtaka væleydnaðu tiltøkini í Havn og í Suðuroynni. Men eg eri sjálvsagt sera glaður fyri, at dillan við at renna, ganga ella bara røra seg meira í ár eisini fer at spreiða seg til Klaksvíkar, til Runavíkar og til Vágarnar, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum. Við at víðka um tiltakið frá tveimum til fimm lokalar heilsurenningar, er neyvan ivi um, at luttakaratalið verður hægri enn undanfarnu árini. Í fjør luttóku fleiri enn 1.000 fólk í Havn og útvið 600 fólk í Suðuroynni í Fólkaheilsurenningini.

Fólkaheilsurenningin er ein liður í arbeiðinum hjá landsstýrinum at betra um fólkaheilsuna hjá føroyingum. Endamálið við fólkaheilsurenningini er ikki at kappast, men at geva øllum - yngri sum eldri - eitt gott og hugnaligt høvi at røra seg. Tað stendur sjálvsagt púrasta upp til tey luttakandi, um tey vilja renna ella ganga teinin; mest umráðandi er at vera við.

- Við at skipa fyri Fólkaheilsurenning, ynskja vit at gera vart við týdningin av at liva sunt. Øll hava vit gott av at røra okkum eitt sindur, og tí vóni eg at síggja nógv fólk til renningina, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sum saman við ítróttarfelagnum Bragdinum, Føroya Shell, Tryggingarfelagnum Føroyum og Suðuroyar Sparikassa skipar fyri Fólkaheilsurenningini 2006.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, leggur harafturat dent á, at fremjanin av hesi umfatandi skrá – við heili fimm lokalum tiltøkum – er ógvuliga nær tengd at teimum mongu sjálvbodnu kreftunum, sum tey lokalu rennifeløgini fús leggja í tiltakið. Tey eru Bragdið, Treysti, Hvistan, Roysnið og Frælsi.

### Øll kunnu luttaka í Fólkaheilsurenningini

Luttakararnir verða býttir í tveir bólkar: børn (fødd 1993 og yngri) og vaksin (fødd 1992 og eldri).

Børnini renna 2 kilometrar. Vaksin kunnu velja 2 ella 5 kilometrar. Fyri fólk, sum ikki eru von at renna ella íðka annan ítrótt, tykjast 5 kilometrar kanska sum ein ov langur teinur og tískil ber eisini til at velja 2 kilometrar, so ongin orsøk er at halda seg aftur.

Fólkaheilsurenningarnar verða hesar dagar:

Leygardagin 23. september í Havn – (tilmeldingarfreistin er 21. september)

Sunnudagin 24. september í Runavík – (tilmeldingarfreistin er 21. september)

Leygardagin 30. september í Vági – (tilmeldingarfreistin er 28. september)

Sunnudagin 1. oktober í Klaksvík – (tilmeldingarfreistin er 28. september)

Leygardagin 7. oktober í Vágum – (tilmeldingarfreistin er 5. oktober).

### Tilmelding

Tilmelding til Fólkaheilsurenningina 2006 fer fram á hesum støðum: á heimasíðuni hjá Bragdinum, www.athletics.fo, hjá Føroya Shell, tlf. nr. 34 74 00, á deildunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum kring landið og á deildunum hjá Suðuroyar Sparikassa í Vági, á Tvøroyri og í Havn.

Børn og vaksin gjalda 20 kr. fyri at vera við. Luttøkugjaldið verður goldið, tá byrjanarnummarið verður avheintað.

### Vinningar

Lutakast verður um ymsar vinningar millum allar luttakararnar. Drigið verður til hvørja renning. Vinningarnir verða ferðaseðlar frá Atlantic Airways og gávukort frá Føroya Shell og Suðuroyar Sparikassa.

Allir luttakarar fáa frukt og okkurt leskiligt at drekka. Harumframt fáa tey luttakandi eina t-shirt við prenti á til minnis um dagin.

### Upplýsing og ráðgeving um heilsu

Í sambandi við Fólkaheilsurenningina skipa Fyribyrgingarráðið og ymisk áhugafeløg fyri tiltøkum, har tað ber til at fáa upplýsing og ráðgeving um heilsuna.

## Fyrilestur í Tilhaldinum um venjing av eldri fólki

TÍÐINDASKRIV

*frá Fysioterapeutfelag Føroya*

Í sambandi við at skipað verður fyri skeiði í geriatri í Føroyum, verður almennur fyrilestur í Tilhaldinum 20.09.06 kl. 15.00. Fyrilesturin nevnist : "Rørsla".

Í einari tíð har fokus er á eldraøkinum og fysiskum aktiviteti, er tað umráðandi at fylgja við. Geriatri er læran um fyribyrging, sjúkugreining, viðgerð og rehabilitering av eldri fólki. Nógvar kanningar eru gjørdar, sum vísa, at fysiskur aktivitetur betrar heilsuna, økir lívsvirðið og leingir lívið. Fysioterapeutfelag Føroya hevur verið so heppið at fáa eitt av størstu nøvnunum innan hetta økið, Ninu Beyer, at játta at koma til Føroyar at hava skeið.

Nina Beyer er útbúgvin fysioterapeutur. Hon hevur arbeitt við ítróttarmedisini síðan 1985 og síðan 1995 við denti á venjing av eldri fólkum og sjúklingabólkum. Nina Beyer er nú sett í granskingarstarv innan "Idrætsmedisinsk Forskningsenhed" á Bispebjerg Sjúkrahúsi. Úrslitið av granskingarverkætlanini hjá Ninu Beyer hevur víst, at tað er sera umráðandi at venja vøddastyrki hjá eldri fólki, og at tey eldru, sum luttóku í hennara venjingarætlan, bøttu um vøddastyrki svarandi til ynging upp á 10 til 20 ár.

Á hesum skeiði fáa fysioterapeutar og ergoterapeutar møguleika bæði í teori og praksis at økja sín kunnleika innan kanning og venjing til eldri og gomul, bæði almenn fyribyrging og til serligar sjúklingabólkar. Talið av pensionistum fer at økjast nógv, og fyribyrging er tað øki, vit mugu satsa nógv uppá, tí her er peningur at spara, og kunnu vit vera við til at geva fólki ein virðiligari aldurdóm.




Marknaðarrák

# Rávørur lækkaðar

Farna vika var rættiliga friðarlig á flestu marknaðum. Alheims partabrøv hækkaðu um 1%, og flestu gjaldoyru fluttu seg lítið í mun til hvørt annað. So var tó ikki á rávørumarknaðunum. Vit skrivaðu í síðstu viku um, at oljuprísurin var lækkaður. Hann helt á at lækka í farnu viku, men Brent oljan kostar nú aftur 63 dollarar fyri tunnuna. Prísurin var í vikuni niðri á 61 dollarum, hetta er tað lægsta síðan mars mánað. Síðstu dagarnar er lækkingin tó steðgað. Aðrar rávørur lækkaðu eisini nógv í farnu viku. Vísitalið CRB, ið umfatar nógvar ymiskar rávørur, lækkaði soleiðis 5% í farnu viku til 305. Hetta er tað lægsta síðan juli 2005.

### Lánsbrævarentur støðugar

Lánsbrævarenturnar hava aftur verið støðugar farnu vikuna. 10-ára rentan er 3,85%. Munurin millum renturnar á stuttum og longum lánsbrøvum er sera lítil. Rentan á 1-árs statslánsbrævi er um 3,75%. Fyri einum ári síðani var rentumunurin heilt uppi á 0,85%, móti 0,10% nú. Hetta merkir, at lánsbrævaíleggjarar eru vorðnir meiri váðafúsir.

### A. P. Møller – Mærsk kann koma undir trýst

Kappingarneytin hjá A. P. Møller – Mærsk (APM), Neptune Orient Lines, hevur júst kunngjørt eina mánaðarliga rakstrardagføring. Dagføring vísti á framhaldandi lækkandi fraktratur. Tí eru vit enn sannførd um, at lækkandi fraktratur aftur kunnu fara at merkja APM og at trýst sannlíkt aftur kemur á APM kursin.

Seinastu dagarnar eru partabrøv eisini merkt av skiftandi rávøruprísunum, serliga oljuprísinum, og óttanum um øktan prísvøkstur. Meðan oljuprísurin er lækkaður 20% síðani í august, eru evropisk partabrøv hækkaði 4% og norðurlendsk góð 5%. At oljuprísurin er hækkaður eitt vet seinastu dagarnar hevur merkt partabrøv, men tó avmarkað.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna verður USA í andgletti. Serligur áhugi verður fyri, hvat tjóðbankastjórin, Bernanke, fer at siga aftan á rentufundin hóskvøldið. Annars verða eyguni framvegis havd við rávøruprísunum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 588,81 | 0,2% | ↑ |
| JPY | 4,99 | 0,0% | → |
| GBP | 1.107,86 | 1,1% | ↑ |
| NOK | 90,12 | 0,3% | ↑ |
| SEK | 81,20 | 1,0% | ↑ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 97,97 | -0,1% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 113,12 | 3,6% | ↑ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 580,00 | 1,8% | ↑ |
| KB Trygg Eurostoxx | 104,44 | 0,5% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

*Vika 38*